## Hagtøl frá dystunum:

**Metaloplastika – Neistin** 37-25 (21-12)

Fríggjadagin 3. september 2010

Dómarar: Dalibor Jurinovic og Marko Mrvica, Kroatia

**Málskjúttar hjá Neistanum:**
**Finnur Hansson 7, David Edvardsen 5, Rósing Rasmussen 4, Heini Hanusarson 4, Jón Ludvig 3, Jugoslav Djumic 1 og Carl Herup Olsen 1**

**Neistin – Metaloplastika** 30-34 (13-16)

Sunnudagin 5. september 2010

Dómarar: Dalibor Jurinovic og Marko Mrvica, Kroatia

**Málskjúttar hjá Neistanum:**
**Heini Hanusarson 6, David Edvardsen 6, Finnur Hansson 5, Rósing Rasmussen 4, Ingi Olsen 4, Jón Ludvig 3, Guðfinnur Thorsteinsson 1 og Jákup Apol 1**

## Team Klaksvík hevur funnið venjaran

Poli J. Hansen skal stjórna besta mansliðið hjá Team Klaksvík í komandi kappingarári. Tað boðar felagið frá á sínari heimasíðu. Poli J. Hansen er strandingur, og hann hevur spælt við StíF. Damir Oros verður spælandi hjálparvenjari. Felagið boðar eisini frá, at Zarko Pejovich úr Bosnia er knýttur at hópinum. Team Klaksvík skal spæla í bestu mansdeildini fyri fyrstu ferð í komandi kappingarári.

# Neistin hevði ongan møguleika




*Ingi Olsen, til vinstru, spældi allan dystin í gjár. Heini Hanusarsson, til høgru, fekk reytt kort*
*savnsmynd*

**HONDBÓLTUR** Neistin tapti samanlagt 71-55 í altjóða dystunum móti serbiska Metaloplastika

Uni Holm Johannesen

Føroysku meistaranir vóru ikki førir fyri at hótta serbiska meistaraliðið.

Tað er greiða niðurstøðan aftaná undandystirnar til EHF European Cup.

Metaloplastika vann trygt og uppiborið við 71-55 samanalagt.

Serbisku meistararnir vunnu fyrra dystin við 37-25.

Úrslitið í seinna dystinum var 34-30 til Metaloplastika.

Drúgva mótstøðan kom ikki óvart á føroysku meistararnar. Ingi Olsen, venjari, segði undan dystinum, at hann væntaði sær tveir sera torførar dystir.

– Vit hava sæð upptøkur av Metaloplastika, sum vísa okkum eitt lið, ið bæði telur spælarar, sum eru yvir tveir metrar høgir, og spælarar, sum viga 100 kilo, vísti Ingi Olsen á.

### Væl nøgdur

Metaloplastika rann beinanvegin undan føroyingunum í fyrra dystinum og vann greitt við 12 málum tá avtornaði.

Serbisku meistararnir tóku sær kanska av løttum í gjár, tí Neistin hevði betri pláss at spæla.

Liðini fylgdust í fyrra hálvleiki, men Metaloplastika vann seg framum í seinna hálvleiki, og so var lítið at gera hjá Neistanum.

Heini Hanusarsson fekk reytt kort, tá seinni hálvleikur var hálvrunnin, og tað ávirkaði føroyska liðið.

Jacob Jónsson, hjálparvenjari, sigur í stuttari viðmerking við neistin.fo, at hann er væl nøgdur við avrikið.

– Vit eru sera væl nøgdir við dystin í dag. Eg vil serliga nevna ungu spælararnar, sum veruliga tóku ábyrgd, tá ein av okkara fekk reytt kort, og aðrir vóru skaddir. Tað er eisini frálíkt at enda eina venjingarlegu og tveir altjóða dystir við einum góðum dysti, og har við einum góðum úrsliti. Menn stríddust veruliga fyri sakini í dag, sigur Jacob Jónsson.

Jugoslav Djumic og Sjúrður Thomassen spældu ikki við í gjár, vegna skaða.

### Triðja árið

Tað er triðja árið upp í slag, at mansliðið hjá Neistanum roynir seg í evropiskari kapping.

Í fyrraárið luttók Neistin í kappingini fyri meistaralið. Mótstøðuliðið var HC Lovcen úr Montenegro. Í fjør var Neistin í kappingini fyri steypavinnarar, og tá var mótstøðuliðið HC Kolubara úr Serbia.

Neistin spældi, eins og í fjør, báðar dystirnar á útivølli í ár. Tað er fyrst og fremst av fíggjarligum áðum.

### Landskappingin fyri framman

Neistin hevur lagt nógv fyri í fyrireikingunum til komandi kappingarár. Liðið hugsar nú um uppgávuna at endurvinna greipuna, sum felagið tryggjaði sær í fjør.

Altjóða dystirnir hava helst verið frálík fyrireiking, tí liðið hevur eisini verið á venjingarlegu í Danmark, undan fráðferðini til Serbia.

*uni@sosialurin.fo*




*savnsmynd*

# Morten Hust Petersen stovar hondbóltsfelag

**HONDBÓLTUR** Morten Hust Petersen er ein av stigtakarunum til komandi hondbóltsfelag, sum verður stovnað í Kvívík

Uni Holm Johannesen

Morten Hust Petersen.
Claus Rasmussen.
Súni Fríði Barbá.
Og Henrik Gerster.

Tað eru millum leikararnar, sum skulu mynda eitt komandi hondbóltslið úr Kvívík.

Morten Hust Petersen váttaði fyri Rás2 fríggjadagin, at hann er ein av stigtakarunum til eitt nýtt hondbóltsfelag.

Hann hevur stovnað ein bólk á Facebook, har hann spyr um uppskot til navn og annað til felagið.

– Vit eru nakrir, sum fegnir vilja spæla hondbólt, og nú er ætlanin at byrja eitt felag í Kvívík, segði Morten Hust Petersen við Rás2.

Felagið fer fyrst bara at luttaka í triðbestu deildini hjá monnum. Ætlanin er at menna felagið í smáum, so ungdómslið og kvinnulið leggjast afturat í framtíðini.

Liðið fer at spæla sínar dystir í Kollafirði komandi kappingarár.

Morten Hust Petersen hevur verið venjari hjá besta mansliðnum hjá VÍF, og besta kvinnuliðnum hjá Stjørnuni.

*uni@sosialurin.fo*